# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Minningarorð um vermóður mína Guðný Pálsdóttur, Akureyri

**f. 24/7-1924 • d. 23/2-2007**

Omman á Akureyri er farin. Hetta vóru tungu boðini, vit máttu bera hvørjum øðrum henda frostkalda dagin í februar í ár. Ikki tí at hetta kom heilt óvæntað, omman var jú ikki ung longur, hon hevði verið sjúk í eina tíð, og nú var hon mett av døgum.

Sum annar av útlendsku versonum hennara, havi eg, saman við nógvum øðrum, nógv gott at takka Gullý fyri. Allarfyrst at hon vildi lata mær aðra dóttur sína í varðveitslu, um eg kann orða tað so. Eg ikki bara gifti meg við dóttur hennara, men eg tók hana eisini við mær út í onnur lond. Eg veit, at hetta var eitt stórt stig, men hetta var eisini ein stór dóttir, sum eg var, og eri góður við. Hóast vit øll hesi árini ikki bara búðu í hvør sínum býi, men eisini í hvør sínum landi, so má eg siga, at tann kærleiki og tað trúfesti sum Gullý - og eisini Þóroddur, sjálvandi – vístu okkara lítlu familju í útlandinum, er so hugtakandi, at tað ber næstan ikki til at greiða frá tí. Vit vistu altíð, hvar tey vóru, vit vistu altíð hvagar vit kundu leita, høvdu vit tað fyri neyðini. Og vit fingu altíð



svar upp á spurningarnar. Tað besta dømið um hetta stórsligna trúfesti eru bunkarnir av brøvum, sum vit í dag eiga frá ommuni og abbanum á Akureyri. Tað eru ikki smávegis gullkorn, vit fingu sendandi hvørja viku yvir eitt 20-áraskeið undan sms- og telduposttíðini. Søgur og orð sum fara at gera okkum rík í allar ævir. Her funnu nógvir fuglar dagsins teirra rætta flog.

Umframt at vera nógv saman við Gullý og Þóroddi um sumrarnar annaðhvørt á Akureyri, á ferð í Íslandi, ella her í Føroyum, so hevði eg eisini ta gleði at vera granni teirra uppi á Norðurlandinum tvey ár í áttatiárunum. Tvey ógloymandi ár. Tá vóru tey bæði eldru børn okkara smá, og tað var ikki smávegis av kærleika, sum omman og abbin á Akureyri tá góvu okkum øllum. Hesi árini eru væl goymd í minni mínum. Tað sama má sigast um tey bæði árini í nítiárunum, tá ið vit so harðliga høvdu brúk fyri hjálp og stuðli. Tá var Gullý okkum ein ótrúlig hjálp í heiminum í Havnini, eina hjálp sum eg seint verði liðugur at takka fyri.

Góða Gullý. Takk fyri góð minni - og takk fyri alt tað tú gavst mær.

**Martin Næs**

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Poul Nicolaj Mouritsen í Sørvági** fer úr Landssjúkrahúskapellinum í kvøld klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Sørvágs kirkju fríggjadagin klokkan 13. Sungið verður úr Sálmabókini. Tey ið vilja minnast Poul Nicolaj, kunnu lata Diabetesfelag Føroya eina peningagávu, konta í Peningastovnunum.

**Sigtóra Jørgensen**, fødd Johansen, Kollafjørður, andaðist á Landssjúkrahúsinum 20. mars 51 ára gomul. Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum fríggjadagin klokkan 13. Jarðarferðin verður úr Kollafjarðar kirkju fríggjadagin klokkan 15. Tey ið vilja minnast Sigtóru kunnu lata eina peningagávu til Kollafjarðar kirkju, konta í peningastovnunum. hósdagur, 22. mars - 12:35

**Harry Petersen, Sørvágur**, andaðist á Landssjúkrahúsinum týsdagin 20. mars 82 ára gamal. Jarðarferðin verður lýst seinri.

**Torvald Thorsteinsson**, fyrrverandi Timburmeistari á Tvøroyri, andaðist á Suðuroyar Ellis- og Røktarheimi 21. mars 87 ára gamal. Jarðarferðin verður lýst seinri.

**Jytta Schrøter, Nes Hvalba**, andaðist týsdagin 20. mars 80 ára gomul. Farið verður úr kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsið í dag klokkan 17. Jarðarferðin verður úr Hvalbiar kirkju fríggjadagin klokkan 13. Tey ið vilja minnast Jyttu kunnu lata Eldrasambýlinum í Hvalba eina gávu.

**Emma Bech, Porkeri** andaðist á Suðuroyar Ellis- og Røktarheimi mikudagin 21. mars, 91 ára gomul. Kistan fer úr kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi fríggjadagin klokkan 18. Jarðarferin verður úr Porkeris kirkju leygardagin klokkan 13. Sungið verður úr sálmabókini. Tey, ið vilja minnast Emmu kunnu lata Ellisheiminum á Tvøroyri eina peningagávu. Konto í Eik Banka

# Heðin Samuelsen 70 ár

Fyrradagin 20. mars fylti Heðin Samuelsen, ættaður úr Horni í Havn 70 ár. Júst hendan tíðin 1937 hevur verið ein góð tíð fyri Føroyar, tí hetta er ikki minni enn triði 70 ára dagurin 19. ,20. og 21. mars, sum er umrøddur í hesum teigi.

Heðin er sonur Petru og Hannis í Horni, og hann er teirra elsta barn. Petra fylti 95 ár tann 19. februar, og tá høvdu vit umrøðu av hennara og harvið hansara ætt. Hon kemur umframt úr Horni eisini frá Gregersen ættini Fyri oman Oyruna í Syðrugøtu.

Heðin var sum ungur niðri og fekk sær roknskaparútbúging. Tá hann kom heim aftur, fór hann at arbeiða á grannskoðaravirkinum hjá Jógvan Sundstein, har hann var nøkur ár.

Hansara lívsverk gjørdist tó handilsskúlin, og tey munnu vera fá, sum hava sett so ítøkilig fingramerki á føroyska samfelagið sum hann. Heðin tók við sum stjóri á handilsskúlanum fyrst í 1970-unum. Tá var skúlin fyrst og fremst kvøldskúli við "handelsmedhjælpereksamen" sum hægsta prógv.

Heðin hevði greitt visjónir.



Fyrst fekk hann uppgraderað kvøldskúlan við møguleika fyri bæði próvtøku í einstøkum greinum og eisini fyri at fáa merkonomprógv. Undirritaði er ein av teimum mongu, sum havi fingið merkonomprógv, sum umframt tær einstøku lærugreinirnar eisini gevur førleika fyri at hugsa eitt sindur sjálvstøðugt.

Næsta stigið hjá Heðin var at fáa dagskúla, har eisini kundi fáast m. a. hægri handilsskúlaprógv. Hesin skúlin húsaðist fyrst í kjallaranum á gomlu Fiskasøluni yviri við Strond, men her gjørdist skjótt ov trongt.

Næsta stig var at fáa ein nýggjan handilsskúla, og hesin gjørdist veruleiki í 1983 í Havn, sum so fekk fylgi av handilsskúla í Eysturoynni nøkur ár seinni. Tað eru hundraðtals um ikki túsundtals næmingar, sum hava fingið prógv her, og hevur hetta uttan iva havt stóran týdning fyri føroyska samfelagið, og teir munnu ikki vera so fáir av dagsins vinnulívsmonnum, sum eru sprotnir úr handilsskúlanum.

Heðin ásannaði eisini týdningin av at fáa fiskivinnu í skúlanum, og tískil gjørdist fiskivinna ein tvungin lærugrein í so væl FHS sum HH, og gjørdist handilsskúlin einasti skúli við fiskivinnu sum fastari lærugrein.

Heðin hevur eisini onnur áhugamál, sum t. d. ross, sum upptekur hann nógv. Afturat hesum er tað fótbóltur, hann brennir fyri, og tað sigst at vera HB.

Heðin er giftur við Marin av Sandi, og hava tey børnini Hjørdis gift við Andrass Splidt, Bjørt gift við Peter Østergaard og Dánjal giftur við Barbaru Vang, og tey eiga tilsamans 7 børn.

Sum ættaður úr Horni og av Gregersenættini í Gøtu hevur Heðin eitt lætt lyndi, sum ger hann læттan at vera saman við.

Hóast í seinna lagi verður ynskt Heðini tillukku við teimum 70 árunum. Kenna vit hann rætt leggur hann ikki árarnar inn fyri tað!

**ó.**

**Dagurin**

**23. mars. Fidelis.** Sigst at vera halgimenni, sum varð tikið av døgum í Afrika í 5. øld, men annars vita teir einki um hann. Fidelis merkir *tann trúfasti*.

Rasmus Effersøe deyður 1916.

